# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Daniella Samson, Klaksvík**, andaðist 10. mars, 91 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum fríggjakvøldið kl. 18 heim í kirkjuna. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin kl. 13.30.

**Kaj Vilhelm Majer** andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi týsdagin 10. mars, 84 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Føðingar

28. februar fingu Gunvør Reyðberg og Hans Sjúrðaberg, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3900 gr.

2. mars fingu Marie Gyldendal Christensen og John Davidsen, Frederikshavn, ein son. Hann var 46 cm langur og vigaði 2480 gr.

3. mars fingu Anna Kari og Carsey Bjartalíð, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3790 gr.

6. mars fingu Gunrið Finnbjørnsdóttir og Pól Thorsteinsson, Vági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3630 gr.

6. mars fingu Inga og Vinjard Magnussen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4100 gr.

6. mars fingu Sigrun av Vollanum og Jón Brekku, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr.

7. mars fekk Birgit Akraberg Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3050 gr.

9. mars fingu Norðbjørt Hansen og Arthur Petersen, Tórshavn, tvíburðar, døtur. Onnur var 48 cm long og vigaði 2920 gr, hin 46 cm long og vigaði 2395 gr.

10. mars fingu Gudny S. Heinesen og Jacob E. Jacobsen, Strondum, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Petur Zachariassen 65 ár

Týsdagin 10. mars fylti Petur Zachariassen í Hoyvík 65 ár. Petur er úr Havn, sonur Katrinu og Esbern Zachariassen.

Petur tók matematisk studentsprógv í 1962 á VBV við Skansavegin. Síðan fór hann at lesa støddfrøði í Århus, har hann tók cand.scient.-prógv í 1969, tá hann flutti til Keypmannahavnar, har hann hevði fingið starv sum støddfrøðingur á Statens Seruminstitut og arbeiddi við biostatistik.

Í 1971 flutti Petur heim aftur. Eftir í eitt stutt skifti at hava verið lærari í Hoydølum, fór hann á Fróðskaparsetrið, har hann var við til at leggja lunnar undir støðisútbúgvingarnar.

Tey flestu av teimum, sum hava nomið sær náttúruvísindaliga útbúgving á universitetsstigi eru farin undir lesturin á Fróðskaparsetrinum. Vit kunnu eitt nú nevna støddfrøðingar, alisfrøðingar, teldufrøðingar, verkfrøðingar, og jarðfrøðingar. Menningin av Fróðskaparsetrinum hevði við sær, at Fróðskaparsetrið síðst í áttatiárunum gjørdist eitt rættuligt universitet.

Í 1987 varð Petur valdur at vera fyrsti rektarin á Fróðskaparsetrinum, og hann røkti hetta starvið í trý ár.



Tað, sum hevur havt serliga áhugan hjá Peturi, hevur verið teldufrøðin. Í hesum sambandi er áhugavert at nevna, at Petur, eftir áheitan frá ráðnum fyri Fróðskaparsetrið, longu í 1972 hevði almennar fyrilestrar um elektroniska dátuviðgerð. Vit kunnu siga, at hann við hesum sum tann fyrsti gloppaði hurðina fyri føroyingum inn í tann heimin, sum seinni skuldi verða rópt kunningarsamfelagið.

Petur var verkstjóri fyri móðurmálsorðabókina, sum eisini er teldutøk. Forritið til móðurmálsorðabókina, RiSt, er síðani selt uttanlands. Saman við góðum fólki stóð Petur fyri menningini av forritinum.

Petur hevur verið og er virkin á so mongum økjum. Hann var eina tíð ábyrgdarritstjóri á Frøði, og millum mongu nevndar- og álitsessirnar sum hann hevur sitið í, kunnu vit nevna, at hann hevur havt sítt tørn sum semingsmaður. Hann hevur eisini verið við í mongum útbúgvingarnevndum.

Petur giftist í 1966 við Sonju, fødd Magnussen. Tey eiga børnini: Martin, Per, Heine og Anna.

*-red*

# Brandvenjing í SMS




*Nógv virksemi var í SMS hóskvøldið, meðan brandvenjingin fór fram*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nógvur útrykningur var í býnum, tá Tórshavnar Sløkkilið skipaði fyri eini brandvenjing í SMS hóskvøldið.

Umleið kl. 19 hoyrdust nógv útrykningsakfør, sum koyrdu av Brandstøðini í Havn og oman í SMS, har sløkkiliðsfólkini høvdu fingið at vita, at eldur var í. Nógvur roykur var at síggja, og tað luktaði brent. Talan var um eina av mánaðarligu venjingunum hjá sløkkiliðnum.

Venjingin skuldi ímynda, at ein pyromanur hevði blaka ein sonevndan molotovkoktail inn gjøgnum fløskuautomatina í parkeringskjallaranum í SMS. Ung fólk, sum skuldu eitast at sortera fløskur í kjallaranum, vóru við í venjingini, og nøkur teirra vóru borin út í eina ambulansu.

SMS hevur sjálvvirkandi alarmskipan, sum sigur frá á Brandstøðini. Ein sentralur, beint innan fyri eina hurð í niðaru hædd, vísir, hvar í húsinum eldurin er.

Heini Østerø, innsatsleiðari hjá sløkkiliðnum, sigur, at teir skipa fyri venjingum einaferð um mánaðin, og hendan venjingin í SMS var ein av teimum stóru venjingunum.

*mg*